# Bint eina kettu



# Tilfar

Tógv: Navia Trio hvítt (umleið 20 g) og myrkagrønt (umleið 5 g), Navia Uno svart og ljósareytt (umleið 5 g)

2 stokkar nr. 4½

Fyllu

Stoppinál

Ringiklokka 1,3 cm í tvørmáti

**Mannagongd:**



Kroppur og høvd: Kasta 18 eygu uppá stokk nr. 4½ við hvítum. Bint stiklavond aftur og fram, til stykkið er umleið 30 cm (umleið 58 rillur). Læs av.



Halin: Kasta 10 eygu uppá stokk nr. 4½ við myrkagrønum. Bint stiklavond aftur og fram við strípum. Bint skiftivís 4 umfør við grønum og 4 umfør við hvítum, til tað eru 7 strípur tilsaman. Drag tógvið gjøgnum eyguni og stramma eyguni saman.

Síðan seyma vit kettuna saman. Legg tað stríputa stykkið (halan) rætt móti rættu (rangan vendir úteftir) og seyma síðuna saman.



Vend stykkinum og lat fyllu í.



Legg tað hvíta stykkið saman (í helvt) og seyma síðurnar saman.




Vend stykkinum og lat fyllu í. Seyma niðaru síðuna saman.



Seyma síðan oyru á kettuna. Seyma við hvítum umleið 2½ cm (báðar vegir) frá horninum, sí mynd. Stramma tráðin eitt sindur.



Seyma síðan
eygu (svart),
munn (svart),
kampar (svart)
og nøs (ljósareytt)
á trýnið.



Seyma halan á og seyma ringiklokkuna á endan á halanum.



Bregda eitt band at binda runt um hálsin. Klipp 5 x 80 cm av tógvi í hvítum og myrkagrønum. Legg tógvendarnar í helvt, so at tú hevur 5 lykkjur. Samla lykkjurnar og bint knút á endan (hin endan). Nú skal onkur halda endanum, har knúturin er, meðan annar bregdar bandið. Enda við, at tú tekur ein lit og snarar hann um endan. Klipp endarnar javnt umleið 2 cm. Bint bandið um hálsin.